Tryggingareftirlitið

**Tórshavn 30. apríl 2013**
Journalnr.: 10/00026-14

Til móttakaran á viðhefta yvirliti

**Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum**

Tryggingareftirlitið sendir við hesum *Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum* til hoyringar. Sí viðhefta fylgiskjal.

Í mun til galdandi kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum, sum broytt við kunngerð nr. 1 frá 30. apríl 2012, verður framd broyting í háttinum, sum landskassaveðhaldið higartil hevur verið gjørt upp í roknskapinum hjá P/F Føroya Lívstrygging.

Í sambandi við, at tryggingarmongdin við landskassaveðhaldi pr. 1. januar 2012 er avhendað frá P/F Føroya Lívstrygging til dótturfelagið P/F Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag, hevur Tryggingareftirlitið samskift við Vinnumálaráðið um roknskaparligu viðgerðina av landskassaveðhaldinum. Vinnumálaráðið hevur í hesum sambandi boðað frá, at landskassaveðhaldið er at meta sum ein simpul kautión mótvegis tryggingartakarunum, og at P/F Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag ikki við støði í landskassaveðhaldinum hevur nakað krav mótvegis landsstýrinum. Sostatt er ikki at grundarlag fyri at taka landskassaveðhaldið við sum eitt aktiv í roknskapinum hjá P/F Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag. Skotið verður upp at strika tær serligu ásetingarnar viðvíkjandi landskassaveðhaldinum í §§ 19a og 83a í kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

Broytingin í roknskaparligu viðgerðini av landskassaveðhaldinum hevur onga ávirkan á sjálva skylduna hjá landsstýrinum móti tí einstaka tryggingartakaranum.

Henda kunngerð fær eftir ætlan virknað fyri roknskaparár, ið byrja 1. januar 2012.

Møguligar viðmerkingar til uppskotið skulu vera Tryggingareftirlitinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 10. mai 2013. Viðmerkingarnar og spurningar kunnu sendast við telduposti til gn@tryggingareftirlitid.fo ella til Tryggingareftirlitið stílað til Gudmundur E. Nónstein, Skálatrød 20, Postboks 73, FO-110 Tórshavn.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein